# Norðfra hevur fingið føroyingar

**Norðfra hevur meira enn flestu onnur virkir í Føroyum lagt seg eftir at virka vørur til føroyska heimamarknaðin. Fyritøkan hevur prógvað, at rættiliga fitt kann fáast burtur úr hesum marknaði. Av einum samlaðum umsetningi í fjør upp á slakar 20 mió krónur, stavar umleið ein fjórðingur frá sølu á heimamarknaðinum. Sosialurin hevur vitjað Norðfra í Norðdepli**

VIRKISVITJAN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað var í 1997, at Jógvan Høj saman við einum norðmanni, sum hann áður hevði samstarvað við, keypti gamla Frostvirkið í Norðdepli og stovnaði felagið, Sp/f Norðfra.

Norðmaðurin var innkeypari av saltfiski fyri eitt spanskt felag, sum leveraði saltfiskavørur til einar 35 fyritøkur í Spaniu. Í Føroyum keypti hann saltfisk um felagið, Sp/f Fram, sum Jógvan hjálpti honum at stovna.

Á virkinum í Norðdepli høvdu tey maskinur til fleking og flakaskering, og størstu toskarnar skóru tey við hond.

Í umleið eitt ár arbeiddu tey soleiðis bara saltfisk á Sp/f Norðfra.

– Tað gjørdist ov strævið fyri okkum at kappast á saltfiskamarknaðinum, bæði við innkeypi av fisk og úti á sjálvum marknaðinum. Tí avgjørdu vit longu á sumri árið eftir at leggja framleiðsluna um, soleiðis at vit kundu virka frystar vørur.

Tá ið norðmaðurin tók seg burtur úr felagnum, keypti Jógvan Høj eisini partapeningin hjá honum.



*Norðfra í Norðdepli hevur 25% av sínum umsetningi á føroyska heimamarknaðinum*

## Hýsan er álitið

Maðurin aftanfyri Norðfra sigur, at virkið var klárt at fara undir at virka frystar vørur í november 1998.

– Eg vil siga, at virkið nærum varð endavent við hesi umlegging, har umklæðingarrúm, sum áður vóru niðri undir, vórðu flutt upp á loftið, eins og ein laksakryvjilinja varð tikin niður, samstundis sum rúmið bleiv bygt um til skerihøll.

Jógvan Høj sigur, at heilt síðan umleggingina við endan av 1998, hava tey lagt seg eftir at virka frystar vørur – í fyrsta lagi úr hýsu, sum er veidd við línu og síðan úr toski.

– Um summarið, tá ið lítið fæst av hýsu, hava vit eisini arbeitt hvíting. Hýsan er góð til út í mai, og vanliga kemur hýsan ikki aftur, fyrr enn hvítingurin er farin, sigur hann.

Í 1999 byrjaði Norðfra eisini at keypa frysta hýsu frá russum.

– Vit høvdu eitt gott samstarv við Føroya Fiskavirking, sum keypti frystan tosk úr Ruslandi. Toskurin varð arbeiddur á virkinum hjá felagnum í Havn. Tá ið hýsa eisini var upp í frystu veiðini, keyptu vit. Hetta riggaði væl, soleingi vit fingu flutningsstuðul. Men sum so ofta, broyttust fyritreytirnar. Politikararnir avgjørdu at taka av flutningsstuðulin og lovaðu, at triðjalandstollurin skuldi fella burtur. Men okkum kunnugt er hann ikki burtur enn.

Jógvan sigur, at tey keyptu frysta hýsu frá russiskum skipum fram til ár 2002, og seinastu tíðina var flutningsstuðulin burtur.

– Meginparturin av lidnu framleiðsluni fór til USA, og tá ið dollarin fall so ógvusliga, var henda framleiðsla ikki lønandi meira.

Hann sigur, at frysta hýsan var við sum partur av vanligu framleiðsluni, men fiskurin frá føroyskum skipum og bátum – og frysta russiska hýsan, vórðu arbeidd atskild og seld sum tvær ymiskar vørur.

Høvuðsframleiðslan á Norðfra er stór hýsu- og toskafløk við plastik ímillum fløkini og smærri millumløgd fløk, sum tað verður rópt. Jógvan sigur, at ein partur av teimum smærru hýsufløkunum, sum verða einkultfryst, eru ætlað endaliga brúkaranum, eitt nú til fish & ships og til stórkøkar úti í heimi.



*Høvuðsframleiðslan á virkinum er hýsu- og toskaflak*

## Heimamarknaðurin

Norðfra hevur meira enn flestu onnur virkir í Føroyum eisini lagt seg eftir heimamarknaðinum í Føroyum. Fyritøkan hevur prógvað, at rættiliga fitt kann fáast burtur úr hesum marknaði. Av einum samlaðum umsetningi í fjør upp á slakar 20 mió krónur, stavar umleið ein fjórðingur frá sølu á heimamarknaðinum.

– Okkum føroyingum dámar at eiga fisk í boksini, og síðan 2004 hava vit lagt dent á eisini at virka vørur, sum føroyingar vilja hava.

Hann sigur, at serføroysku vørurnar eru fløk – bæði hýsu-og toskafløk, sum ávikavist eru pakkaði í 4,5 og 4 kilo eskjur. Talan er bæði um raspaði og ikki raspaði fløk.

Men úrvalið, sum Norðfra bjóðar føroyingum er nøgv størri enn so.